Hvat sigur CIA til, at Atlantic flygur Høgna Hoydal igjøgnum internationalt luftrúm?

**Maður, 37 ár**

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein

# Miðlamjarr

Verði svøk av anti-parkerings-politikkinum hjá Tórshavnar býráð! Vit hava bil - so droppið hatta tvætlið um bilfrían bý!

**Kvinna, 25 ár**



*Tá ið eg líti aftur á, eri eg mest errin av, at vit hava yvirlivað tað, sum vit hava verið ígjøgnum seinastu 30 árini.*

Lars Ulrich, trummuspælari í rockbólkinum Metallica (Ekstrablaðið)



*Kvinnur duga ikki rangstøðureglarnar*

Tað kostar Sky Sports legenduni Andy Gray starvið, at hann finnist at kvinnuligum hjálpardómara

*Ein rættiliga stórur partur av fremstu vinnulívsmonnunum í føroyska samfelagnum koma væl undir heitið "gudiligir"*

John William Joensen í viðmerking um Kjølbro (Norðlýsið)




*Tá eg eri svong, eti eg. Tá eg eri tyst, drekki eg. Tá eg havi hug at siga okkurt, so sigi eg tað.*

Songkvinnan Madonna



*- Vit hava 190 pør av skoytum og tað halda vit vera nóg mikið, tí við nógv meiri pørum hevði tað helst gjørst heldur trongt á breytini*

Heðin Mortensen, borgarstjóri (Portal.fo)



Í hesum tíðum verða fleiri pengar brúktir uppá silikonboppir og viagra tablettir,enn til granskingar av Alzheimers sjúku. So um eini 30 ár sita vit øll við stórum boppum og stívari standing, og ongin minnist hví...

**Maður, 40 ár**

*Tað mugu verða meira áhugverd ting í verðini enn mín fortíð.*

Sjónleikarin Charlie Sheen hevur ikki so góðan hug at tosa um, hvat hevur hann gjørt og ikki





*Eg elski formar. Tað tiltalar meg ikki at verða super-kløn*

Amerikanska reality-stjørnan Kim Kardashian

Skal kirkjan hitast vid jørðhita? Hvør leverer hann?

**Maður, 37 ár**

Hvussu gamalt heldur títt 2,65 ára gamla barn seg egentliga vera, tá hon spyr: "Minnist tú, tá eg var baby?"

**Kvinna, 29 ár**